FISKIMÁLARÁÐIÐ

Tvøroyrar kommuna
Postboks 80
800 Tvøroyri

**Stjórnarskrivstovan**
24. mars 2014
Mál: 13/00810-11
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: EA/KHP

Tygara skriv: 02.00.00-P24-2-12

**Broytingar í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013, hevur Tvøroyrar kommuna sent Fiskimálaráðnum uppskot til broytingar í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu til góðkenningar.

Talan er um hesar broytingar:

Økisbroytingar:

- Øki 1: Nýtt sethúsaøki í Øravík
- Øki 2: Nýggja Ítróttarøkið Trongisvági broytt frá øki E til øki F (frítíðarøki)
- Øki 3: Lítið fríøki í Trongisvági verður broytt til øki B (bústaðarøki) og lendið undir gomlu dansistovuni í Trongisvági verður broytt frá øki E til øki B (bústaðarøki).
- Øki 4: Havnarøkið á Drelnesi verður víðkað út á 12 metrar dýpi
- Øki 5: víðkan av havnarøki á Tvøroyri (við Delta Seafood)
- Øki 6: Fótbóltsvøllurin á Sevmýri verður broyttur frá øki E til øki F (alment frítíðarøki) Eitt øki í Froðba verður broytt frá øki E (almennir stovnar) til øki B (bústaðarøki)

Broytingar í ásetingini í byggisamtyktini:

- § 10 um undantaksloyvi verður sett inn
- § 11 verður "kærumøguleikar" við broyttum teksti
- Eitt stk. 7 verður skoytt uppí § 29, havnarøki

Sagt verður frá, at Fiskimálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini, góðkennir broytingarnar í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu.

Víst verður eisini til ætlanarskrivið frá Fiskimálaráðnum, dagfest 31. januar 2014.

Góðkenningin í byggisamtyktini fritekur tó ikki kommununi at fáa til vega møguliga onnur loyvir frá øðrum myndugleikum.

Hjálagt rættaður byggisamtyktartekstur og kortskjal við átekning frá Fiskimálaráðnum.

Vinarlig heilsan

Elinborg Apol
løgfrøðingur

Ministry of Fisheries
Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

FISKIMÁLARÁÐIÐ

Tvøroyrar kommuna
Postboks 80
800 Tvøroyri

**Stjórnarskrivstovan**
31. januar 2014
Mál: 13/00810-9
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: EA/KHP

Tygara skriv: 02.00.00-P24-2-12

**Viðv. broytingum í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu**

Tvøroyrar kommuna hevur við skrivi, dagfest 25. juni 2013, sent Innlendismálaráðnum nú Fiskimálaráðnum uppskot til broytingar í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu til góðkenningar.

Talan eru um fleiri økisbroytingar umframt broytingar í orðingini í almennu byggisamtyktini.

Økisbroytingar:

- Øki 1: Nýtt sethúsaøki í Øravík
- Øki 2: Nýggja Ítróttarøkið Trongisvági broytt frá øki E til øki F (frítíðarøki)
- Øki 3: Lítið fríøki í Trongisvági verður broytt til øki B (bústaðarøki) og lendið undir gomlu dansistovuni í Trongisvági verður broytt frá øki E til øki B (bústaðarøki).
- Øki 4: Havnarøkið á Drelnesi verður víðkað út á 12 metrar dýpi
- Øki 5: víðkan av havnarøki á Tvøroyri (við Delta Seafood)
- Øki 6: Fótbóltsvøllurin á Sevmýri verður broyttur frá øki E til øki F (alment frítíðarøki) Eitt øki í Froðba verður broytt frá øki E (almennir stovnar) til øki B (bústaðarøki)

Broytingar í ásetingini í byggisamtyktini:

- § 10 um undantaksloyvi verður sett inn
- § 11 verður "kærumøguleikar" við broyttum teksti
- Eitt stk. 7 verður skoytt uppí § 29, havnarøki

Broytingarnar hava ligið alment frammi frá 25. februar til 19. mars 2013. Tá freistin at koma við møguligum mótmælum ella broytingaruppskotum var úti, 9. apríl 2013, hevði kommunan móttikið eitt mótmæli frá Søvn landsins, sum ger vart við, at kommunan skal taka hædd fyri at jarðfest fornminni er á matr. nr. 127a. Kommunan viðmerkir, at ongar broytingar verða gjørdar nærhendis matr. nr. 127a.

Fiskimálaráðið hevur móttikið ummælir frá Býarskipanarnevndini, dagfest 24. september, 10. desember 2013 og 21. januar 2014. Sí viðløgdu avrit.

Fiskimálaráðið tekur undir við viðmerkingunum frá Býarskipanarnevndini og ætlar at góðkenna broytingarnar í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu.

Áðrenn Fiskimálaráðið fer at góðkenna broytingarnar skal ráðið hava fingið dagført kort og byggisamtyktartekst fyri Tvøroyrar kommunu í 3 einsljóðandi eintøkum. Broytingin og nýggja dagfestingin skulu síggjast týðuliga á hesum eintøkum.

Eisini verður biðið um at fáa tilfarið sent sum PDF fíl til fisk@fisk.fo. Tá broytingin verður góðkend verður saman við góðkenningini sent dagført kortskjal við átekning frá Fiskimálaráðnum.

Vinarlig heilsan

Elinborg Apol

løgfrøðingur

| Broyting av byggisamtyktini<br>fyri<br>Tvøroyrar kommunu | |
|---|---|
| *FISK mál nr.:* FISK 13/00810 | |
| *BN mál nr.:* US 13/00333 | |
| ***Lýsing av málinum:*** | **Øki 5: Víðkan av havnarøki á Tvøroyri**<br><br>Endamálið er at gera tað møguligt Hjá Delta Seafood at byggja kaj, og at gera broytingar í bátahylinum um neyðugt.<br><br>Partur av øki 5 (økið við Varðan Pelagic) varð góðkent av IMR sambært broyttu mannagongdini sambært løgtingslóg nr. 19 frá 18 mars 2013. |
| *Samtykt:* | 25. februar 2013 |
| *Framløga:* | 25. februar til 19. mars 2013 |
| ***Broytingaruppskot og mótmæli:*** | Einki broytingaruppskot ella mótmæli |
| ***Sent IMR til góðkenningar:*** | 25-06-2013 |
| ***Sent nevndini til ummælis:*** | 02-07-2013 |

Býarskipanarnevndin viðgjørdi ætlaðu broytingarnar av byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu á fundi 10. september og 3. desember 2013 og 21. januar 2014.

**Nevndin mælir til at góðkenna ætlaðu broytingarnar.**

**Býarskipanarnevndin, 21. januar 2014**

Jóanna Djurhuus, formaður

**Suni Petersen, skrivari**

| **Broyting av byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu** | |
|---|---|
| *IMR mál nr.:* IMR 13/00363 | |
| *BN mál nr.:* **US 13/00333** | |
| ***Lýsing av málinum:*** | • Broyting av byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu til ummælis:<br>• Talan er um fleiri økisbroytingar umframt eina broyting í orðingini í almennu byggisamtyktini. Ein av økisbroytingunum er longu góðkend sambært framskundaðari mannagongd (lógarbroyting).<br>• Øki 1: Nýtt sethúsaøki í Øravík.<br>• Øki 2: Nýggja Ítróttarøkið Trongisvági broytt frá øki E (alment endamál) til øki F (frítíðarøki)<br>• Øki 3: Lítið fríøki í Trongisvági verður broytt til bústaðarøki fyri at kunna fremja marknaumskipan.<br>• Øki 4: Havnarøkið á Drelnesi verður víðkað út á 12 metra dýpi.<br>• Øki 5: Víðkan av havnarøki á Tvøroyri.<br>(Partur av málinum er er góðkent av IMR sambært broyttu mannagongdini sambært løgtingslóg nr. 19 frá 18 mars 2013).<br>• Øki 6: Fótbóltsvøllurin á Sevmýri verður broyttur frá øki E (almennir stovnar) til øki F (alment frítíðarøki), og eitt øki í Froðba verður broytt frá øki E (almennir stovnar) til bústaðarøki.<br>• Broytingar í hesum ásetinigum í byggisamtyktini:<br>– § 10 um undantaksloyvi verður sett inn,<br>– § 11 verður "Kærumøguleikar" við broyttum teksti<br>– eitt stk. 7 verður skoytt uppí § 29, Havnarøki (í umsóknini stendur § 27). |
| ***Samtykt:*** | 25. februar 2013 |
| ***Framløga:*** | 25. februar til 19. mars 2013 |
| ***Broytingaruppskot og mótmæli:*** | Søvn landsins hevur gjørt vart við, at kommunan skal taka hædd fyri, at jarðfest fornminni er á matr. nr. 127a.<br>Kommunan viðmerkir, at ongar broytingar verða gjørdar nærhendis matr. 127a. |
| ***Sent IMR til góðkenningar:*** | 25-06-2013 |
| ***Sent nevndini til ummælis:*** | 02-07-2013 |

Býarskipanarnevndin viðgjørdi ætlaðu broytingarnar av byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu á fundi 10. september og 3. desember 2013.

**Nevndin mælir til at góðkenna ætlaðu broytingarnar.**
**Tó hevur nevndin nakrar spurningar til øki 5 (havnarøkið á Tvøroyri), og valdi at venda aftur til málið á komandi fundi.**

**Býarskipanarnevndin, 10. desember 2013**

Jóanna Djurhuus, formaður

Suni Petersen, skrivari

| Broyting av byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu | |
|---|---|
| *IMR mál nr.:* | IMR 13/00363 |
| *BN mál nr.:* | **US 13/00333** |
| ***Lýsing av málinum:*** | **Broyting av byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu til ummælis**: Talan er um fleiri økisbroytingar umframt eina broyting í orðingini í almennu byggisamtyktini. Ein av økisbroytingunum er longu góðkend sambært framskundaðari mannagongd (lógarbroyting).<br>• Øki 1: Nýtt sethúsaøki í Øravík.<br>• Øki 2: Nýggja Ítróttarøkið Trongisvági broytt frá øki E (alment endamál) til øki F (frítíðarøki)<br>• Øki 3: Lítið fríøki í Trongisvági verður broytt til bústaðarøki fyri at kunna fremja marknaumskipan.<br>• Øki 4: Havnarøkið á Drelnesi verður víðkað út á 12 metra dýpi.<br>• Øki 5: Víðkan av havnarøki á Tvøroyri. (**Málið er góðkent av IMR sambært broyttu mannagongdini sambært løgtingslóg nr. 19 frá 18 mars 2013**).<br>• Øki 6: Fótbóltsvøllurin á Sevmýri verður broyttur frá øki E (almennir stovnar) til øki F (alment frítíðarøki)<br>Broyting í ásetinigni í byggisamtyktini:<br>• § 10 um undantaksloyvi verður sett inn,<br>• § 11 verður "Kærumøguleikar" við broyttum teksti<br>• eitt stk. 7 verður skoytt uppí § 29, Havnarøki (í umsóknini stendur § 27). |
| ***Samtykt:*** | 25. februar 2013 |
| ***Framløga:*** | 25. februar til 19. mars 2013 |
| ***Broytingaruppskot og mótmæli:*** | Søvn landsins hevur gjørt vart við, at kommunan skal taka hædd fyri, at jarðfest fornminni er á matr. nr. 127a.<br>Kommunan viðmerkir, at ongar broytingar verða gjørdar nærhendis matr. 127a. |
| ***Sent IMR til góðkenningar:*** | 25-06-2013 |
| ***Sent nevndini til ummælis:*** | 02-07-2013 |

Býarskipanarnevndin viðgjørdi ætlaðu broytingarnar av byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu á fundi 10. september 2013.

**Nevndin mælir til at góðkenna ætlaðu broytingarnar.**

**Býarskipanarnevndin, 24. september 2013**

| | |
|---|---|
| ........................................................ | ........................................................ |
| Jóanna Djurhuus, formaður | Suni Petersen, skrivari |